# Stór konsert í Runavík

**Fríggjakvøldið 28. oktober fara Lena, Týr og 200 á pall í Ítróttarhøllini í Runavík. Eftir konsertina spæla Showmenn til dans**

KONSERT
*tíðindaskriv*

Konsertin er partur av Mentanarvikuni í Runavík 23.-30. okt. Runavíkar kommuna hevur tikið stig til mentanarvikuna í sambandi við at vinnustevnan FaroExpo'05 verður hildin í Runavík 25.-27. oktober.

Á konsertini spæla LENA, Týr og 200. Í pallskiftunum undirheldir Føroya besti skemtari, Hilmar Jan Hansen og eftir konsertina spæla Showmenn til dans í høllini.

Atgongumerkini til konsertina eru ókeypis og kunnu avheintast á øllum deildum hjá Føroya Sparikassa frá mánadegnum 17. oktober. Atgongumerkini skulu avheintast persónliga og nøgdin er avmarkað. Aldursmarkið er 15 ár. Konsertin byrjar kl. 21 og endar kl. 24.

Eftir konsertina verður dansur við Showmonnum í ítróttarhøllini. Kostnaður 150 kr. fyri atgongumerki.

Millum konsertina og dansin verður skipað fyri spennandi trendshow, har mótahandlarnir Trendfloor og Shop-In luttaka í einum telti uttanfyri høllina.

Nærri fæst at vita um hvussu bussar koyra til og úr Runavík til konsertina og dansin.



*Lena*




*Hilmar Danielsen var ikki sørt errin, tá hann varð róptur á pallin at taka ímóti heiðurslønini*

# EL-IN kosin til ársins handil í 2005

**Á stórari sølustevnu innan HI-FI í Herning varð El-IN kosin sum ársins handil herfyri**

Starvsfólk hjá EL-IN vóru seinasta vikuskiftið í Herning á sølustevnu innan HI-FI. Tað er stóra handilsrøðin Expert, sum hevði savnað limirnar í danska kongaríkinum til eitt árligt tiltak, har tað nýggjasta innan HI-FI verður víst fram.

Á stórari gallaveitslu leygarkvøldið, við 1100 luttakarum, var "Ársins handil 2005" kosin fyri tær tríggjar deildirnar hjá Expert, sum eru EXPERT, 2TAL, og BLÅ GRUPPE.

-Tað kom sera óvart á okkum, at EL-IN var »nominerað« til hesa heiðursløn, og vit gjørdust ikki minni bilsin, tá vit vóru rópt upp á stóra pallin at taka ímóti heiðurslønini sum ársins handil 2005. Heiðurslønin var ein gávukekkur umframt blómur og onkur prýðislutur, sigur Hilmar Danielsen stjóri í EL-IN.

– At hetta var ein stórur heiður gjørdist enn týðiligari dagin eftir, tá vit møttu á messuni. Har var gjørt klárt til at gera upptøkur um okkum og tað var eingin endi á blíðskapinum, allastaðni har vit komu. Hetta gjørdi tað so nógv lættari at fáa hendur á júst teimum avtalum, sum vit høvdu sett okkum fyri frammanundan, sigur Hilmar Danielsen víðari.

Um BLÅ GRUPPE deildina kann nevnast, at hon er tann parturin av Expert samtakinum, sum hevur líknandi handlar sum EL-IN sum limir. Hetta eru handlar sum vanliga hava bæði HI-FI og hvítvørur at selja. Í samtakinum eru 65 handlar kring alt Danmark, umframt Bærentsen Teknik á Tvøroyri og EL-IN. Expert handilsrøðin er sera stór, er at finna í fleiri londum, og eru tað norðmenn sum eiga hana.

Heiðurshandan á gallaveitslu í Herning leygarkvøldið 8. oktober 2005. Kjósanin av "Ársins handil í Blå Gruppe 2005 varð grundað við hesari orðing: *»EL-IN blev kåret som årets butik i Blå Gruppe, butikken kan levere alt til boligen, el installation, hvidevarer, lamper og brunevarer og bygger nu 500 m² forretning beliggende ved den nye tunnel under temaet. Alt til boligen under et tag og samler dermed sine aktiviteter.*

*El-IN driver forretning med en høj profil af kendte mærker, og vil ikke gå ind i nogen form for discount, og virksomheden har konkluderet for længst, at det er kvalitet og service man skal profilere.«*




**Hans Berntsen í Føroyum**

Hans & Inge Berntsen vitja í Føroyum dagarnar 20.–26. oktober, har tey fara at tosa – og biðja fyri sjúkum.

Café One Way

Hósdagin 20. oktober
kl. 20 í Oasuni í Hoyvík

Fríggjadagin 21. oktober
kl. 20 í Samljóð í Skopun

Leygardagin 22. oktober
kl. 20 í Samljóð í Skopun

Sunnudagin 23. oktober
kl. 15 í Skúlahøllini í Trongisvági

Mánadagin 24. oktober
kl. 20 í Filadelfia í Havn

Týsdagin 25. oktober
kl. 20 í Evangeliihúsinum í Havn

Mikudagin 26. oktober
kl. 20 í Kelduni í Skálabotni

**Øll eru vælkomin**
Persónlig forbøn fyri øllum, ið ynskja tað

Hagstova Føroya kunnger øll hagtøl á internetinum - heldur enn í pappírsútgávum. Á heimasíðu okkara **www.hagstova.fo** er eitt leitiamboð og ein datagrunnur - HAGTALSGRUNNUR - sum vit nevna hann. Her finnur tú øll hagtølini um landið tú býrt í og fólkini tú býrt her saman við.



DUGIR TÚ AT BRÚKA HAGTALSGRUNNIN?

Í november fer Hagstovan at bjóða fram skeið um at brúka hagtalsgrunnin - eitt amboð at velja sær hagtøl av heimasíðuni hjá Hagstovuni.

Í hagtalsgrunninum goyma vit hagtølin, so at brúkarin fær ríkar møguleikar at velja sær tað hann vil síggja. Skipanin loyvir tær at taka tey valdu hagtølini fram í ymsum sniðum, eitt nú sum Excel-ark ella í teigamarkaðum sniði. Haraftrat kanst tú snúgva talvunum alt eftir, hvat tú vilt hava standandi í vinstra teigi og í talvubreddanum. Tú kanst eisini gera samanteljingar av ymsu greiningunum.

Skeiðið verður í teldustovuni hjá Fíggjarmálaráðnum. Um áhugin er nóg stórur, verður skipa fyri trimum skeiðum. Pláss er fyri 9 fólkum hvørja ferð.

Skeiðið verður týsdagarnar 8., 15. og 22. nov. 2005, kl. 09.00-12.00.
Kostnaðurin er 250 krónur.

Tilmelding fer fram á tel 352800 ella við at senda t-post til **hagstova@hagstova.fo** seinast 26. okt. 2005.

TEAMBS

HAGSTOVA FØROYA
TRAÐARGØTA 39 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TEL +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO